gult cyan magenta svart



# Uppskot um roykipolitikk

*Niðanfyri er uppskot um roykipolitikk, sum Nýskipanardeildin á Løgmansdeildini hevur sent almennum stovnum og yrkisfeløgum til hoyringar. Freistin at lata inn viðmerkingar er sett til mánadagin 9. oktober.*




Roykipolitikkurin er áttandi partur av almenna starvsfólkapolitikkinum, og tá roykipolitikkurin verður settur í verk, verður rundskriv landsstýrisins um royking frá 27. apríl 1989 sett úr gildi, sigur Nýskipanardeildin á Løgmans-skrivstovuni í tíðindaskrivi.

Uppskotið er soljóðandi:

Uppskot um roykipolitikk
**Roykipolitikkur**
Ásannandi, at royking er heilsuskaðilig, skal roykipolitikkurin tryggja roykfrítt umhvørvi á øllum almennum arbeiðsplássum.

**Endamál**
Endamálið er at seta upp fyriskipanir á arbeiðsplássinum á ein slíkan hátt, at ynski hins einstaka í mest møguligan mun kunnu verða gingin á møti.

**Roykfrí øki**
- Arbeiðshøli, har fleiri enn eitt starvsfólk arbeiða
- Høli, har viðskiftafólk verða avgreidd
- Matstovur
- Fundarrúm
- Felagshøli

**Hesi eru:**
- gongir
- kopirúm
- setstovur
- lyftur
- nátthús
- osfr.

**Undantøk**
Arbeiðshøli, har bert 1 fólk arbeiðir, eftir avtalu við leiðsluna. Hurðin skal skal vera aftur, og hóskandi útlufting vera, um roykt verður.

**Skelting**
Stovnurin kann gera serlig roykihøli. Verða slík høli gjørd, skulu hesi hava sjálvstøðuga luftreinskingarskipan og liggja á so lítið árendum staði sum gjørligt.

**Upplýsing, ráðgeving v.m.**
Arbeiðsplássið skal við uppsløgum, skeltum og á annan hátt vísa á møgulig roykihøli og lýsa roykiforboð.

Upplýsing á arbeiðsplássinum um vandan av royking kann umfata fundir, møguliga við luttøku av ráðgevum uttanífrá, skrivligt tilfar, innanhýsis og/ella uttanhýsis skeið v.m.

Harafturat kann arbeiðsplássið hava ein leiklut í sambandi við sjálvbodna avvenjing hjá starvsfólki.

Orðaskifti:

# Áðrenn og aftaná

Á hjartadeildini á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn sótu 7 føroyingar. Tveir høvdu fingið víðkað æðrar í hjartanum við ballón og fingið bysning ísettan. Tríggir skuldu fáa hesa viðgerð dagin eftir. Tveir skuldu fáa bypass tvs. skifta æðrar um nakrar dagar, og tveir vóru júst heimfarnir frískir eftir bypass. Hetta er føroyskur gerandisdagur á Ríkissjúkrahúsinum — enn. Ikki uttan gálgahumor vóru hesi 7 samd um, at tey vóru heppin at hava fingið hjartatrupulleikar aðrenn fullveldið. Enn kundi livsneyðug hjálp fáast í Keypmannahavn.

Ein banal søga heldur onkur, men deyðans ella lívsins álvari fyri tey, ið sjúkan rakar.

Prátið gekk. Onkur hevði vitjað føroyingar á øðrum deildum, og nógvir føroyingar liggja á Ríkissjúkrahúsinum. Fleiri høvdu búð á Hotell Tórshavn, hesum føroyska baklandinum áðrenn innlegging, og har búðu eisini avvarðandi.

Á sjúkrahúsinum hava eisini tann føroyski presturin og trúboðarin í Kristnastovu sína gongd.

Samanumtikið eitt *føroyskt* umhvørvi, har okkara landsmenn fáa lívsneyðuga viðgerð á jøvnum føti við danir, har læknar og starvsfólk tosa eitt mál, føroyingar duga. Eitt stað har føroyingar kenna seg tryggar.

Hetta omanfyri fær meg at minnast ein Fimmara í Útvarpinum, har Helena D. á Neystabø tosaði um heilsurøkt eftir loysingina. Fyri hana og loysingarfólk, ið ringdu inn, var onki problem, um vit mistu Ríkissjúkrahúsið og tað danska heilsuverkið annars. Sjúklingar kundu sendast verðina runt. Til Ísland sjálvandi, til Svøríki, Týskland, USA og aðrastaðni.

Tað er bara so, at eitthvørt land ella ríki hugsar fyrst um sínar egnu borgarar, meðan útlendingar koma í aðru røð. Sama hvussu dugnaligir læknarnir eru aðrastaðni, so eiga landsins borgarar fyrsta tørn, og føroyskir sjúklingar fara at standa ella liggja við húgvuni í hondini og bíða eftir avlopstíð í fremmandum umhvørvi uttan at skilja viðkomandi mál, kanska við eini sjúku har sjálvt minuttirnir telja, um viðgerðin eydnast ella ikki.

Ein ræðumynd siga tjóðveldisfólk. Lívsins álvari sigur javnaðarflokkurin.

Tað er ábyrgdarleyst at fyrigykla fólki, at alt verður sum tað er eftir loysingina. Men hvat? vit hava jú eitt ábyrgdarleyst landsstýri.

**Dan R. Petersen**
**javnaðarmaður**

# Løgmaður, NATO og Partnership for Peace

Í Útvarpi Føroya segði løgmaður seg vera bilsnan yvir brævið frá Niels Helveg Petersen, uttanríkismálaráðharra. Løgmaður helt tað vera løgi, at uttanríkismálaráðharrin segði tað vera neyðugt at hava ein her (egne væbnede styrker), fyri at gerast limur í NATO. Hann undirbygdi hesa staðfesting við at vísa á Ísland, sum ikki hevur nakran her, men kortini er limur í NATO.

**Ísland er ikki limur í PfP**
Í brævinum frá Niels Helveg Petersen stendur als einki um slíka treyt fyri limaskapi í NATO!!!

Men skulu vit hinvegin gerast limir í ”Partnership for Peace”, er neyðugt av hava egnan her. Ísland er ikki limur í ”Partnership for Peace” og tískil er ávísingin hjá løgmanni so heilt burturvið

Tá tú nærlesur umrøðda bræv hjá N. H. Petersen, sum er dagfest 30. august í ár, og kannar nærri hvussu felagsskapirnir NATO og PfP eru skipaðir, undrast tú stórliga yvir alt sum løgmaður segði um brævið og um ætlan landsstýrisins.

**Hví ikki ríkisfelagsskap og NATO?**
Men hvat er tað nú fyri ein felagsskapur, sum er so áhugaverdur, og sum vit kanska skulu gerast limir í, aftaná at samgongan hevur limað okkum úr verandi ríkisfelagsskapi?

Limalondini eru millum annað hesi: Albania, Armenia, Azerbaijan, Belarus, Bulgaria, Croatia, Georgia, Kazakhstan, Romania, Tadjikistan, Turkmenistan, Ukraine, Uzbekistan og onnur fjarskotin lond.

**Hvat er endamálið við at gera okkara verjupolitikk so ótryggan og ræðandi?**
Hvat er endamálið við áhaldandi at íbirta nýggjar og heilt óneyðugar trupulleikar?

Hví ikki heldur lima okkum í NATO í verandi ríkisfelagsskapi?

**Tórshavn 12.09.2000**
**Trygvi F. Guttesen**

## Minningarorð um Marthu Didriksen

Martha Didriksen varð fødd í Nólsoy tann 26. juni 1927 og hon andaðist í Tórshavn tann 21. august 2000 aftan á eina langa sjúkralegu. Nú er hon farin heim til Jesusar. Sloppin undan sjúku og pínu.

Mínir tankar leita til Ovild og børnini: Birgit, Kirstin, Eyðfinn, Lydiu, Øssur og Junn. Harrin hjálpi tykkum og familjum tykkara í sorgini.

Eg havi ikki verið í einum betri heimi enn hjá Marthu og Ovildi. Martha var tann náttúruligi miðdepilin í familjuni. Hon og Ovild bygdu upp eitt heim har kærleiki til børnini, nærtakærleiki og fosturlandsalskur vóru ein sjálvsagdur lutur.

Martha var ein stillfør og jarðbundin kvinna. Hon hvíldi í sær sjálvari og í síni trúgv, og hon hevði – eins og Ovild hevur – eina stóra virðing fyir tí einstaka menniskjanum. Hetta sermerkir eisini børn teirra, sum fingu gott í beinið.

Míni barna- og ungdómsár var eg dagligur gestur í heiminum hjá Marthu og Ovildi. Størri gestablídni havi eg ikki upplivað enn hjá teimum. Tey bæði dugdu sera væl at fáa tann vitjandi at føla seg væl tilpassar. So líkatil og ósnobbut. Tað kunnu onnur enn eg tosa um, tí tað vóru fáir dagar, at ikki onkur kom á gátt hjá teimum. Flestu nólsoyingarnar, eg kenni, eri eg komin at kenna hjá Marthu og Ovildi.

Farin er ein góður vinur, sum eg síggi fram til at hitta aftur heima hjá Harranum.

Ærað veri minnið um Marthu Didriksen.

**Vinarliga**
**Ingemar Djurhuus, Århus**

## Minningarorð um Bjørg Matras



Nú Bjørg er farin, minnist eg aftur á allar tær góðu løtur vit høvdu saman í nógv ár. Eg var í húsi hjá Bjørg og Hera, bæði tá Marna og Erla vóru lítlar og har var ógvuliga gott at vera.

So minnist eg aftur á allar jóladagarnar, Sigurd, eg og børnini høvdu saman við Bjørg, Hera og gentunum, heima hjá teimum, og nýggjársdagarnar heima hjá okkum, tað er hugnaligt at minnast aftur á.

Tá eg so búði í Ballerup og Bjørg var niðri, so hittust vit har, tá eg var heima í feriu, var eg altíð og vitjaði hana, eg sakni hana nógv.

Bjørg gekk eisini høgt upp í sítt arbeiði, bæði sum lærari, á Skúlabókagrunninum og á Landsskúlafyrisitingini.

Góða Martha mostir, Kára, Marna og Erla og familjur tykkara, saknurin er størst hjá tykkum, hon var jú so góð við tykkum, eisini tú Jórun og tín familja.

Góða Bjørg, hvíl í friði.

**Heilsan Elin**

gult cyan magenta svart



# Helveg gav skeivar upplýsingar um NATO



*Føroyar kunnu væl gerast limir í Partnership for Peace uttan at hava her, staðfestir kelda, sum stendur NATO nær*

John Johannessen
Eyðun Klakstein

Fullveldis Føroyar uppfylla politisku karmarmarnar, ið krevjast fyri at gerast limur í verjusamgonguni í NATO, Partnership for Peace.

Hetta staðfestir eitt skjal, sum ein kelda, ið stendur NATO nær, hevur skrivað og sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Keldan staðfestir, at Partnership for Peace ætlanin er væl egnað til lond í slíkari støðu, sum Føroyar, og gevur møguleikar fyri hernaðarligum og politiskum samstarvi innan eina flexibla rammu.

– Føroyar sum fullveldi høvdu uttan iva uppfylt politisku krøvini fyri limaskap, og limaskapurin kundi verið aktuellur innan nakrar fáar mánaðir, staðfestir skjalið.

Víst verður á, at Føroyar kundu verið aktivir limir í felagsskapinum innan tvey ár.

Limaskapurin hevði síðani merkt, at Føroyar gjørdust limir í the Euro-Atlantic Partnership, ið fevnir um samstarv innan tilbúgving og politiska ráðgeving innan øll øki í NATO samanhangi.

Men fyri at fáa hesi rættindi er ikki neyðugt at hava her. Harafturímóti skulu Føroyar seta landaøki og møguleikar av til NATO. Víst verður á Ísland sum dømi. Har eru fleiri enn 3.000 NATO starvsfólk, men eingin veruligur íslendskur herur.

Í brævinum, har danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Pedersen, sýtir løgmanni at koma á tal við NATO aðalskrivaran um limaskap, vísir hann á, at Føroyar mugu hava her fyri at sleppa upp í Partnership for Peace. Somuleiðis vísir danski uttanríkisráðharrin á, at talan er um eina avtalu um veruligt hernaðarligt samstarv.

# Fólkaflokkurin lovar skattalækka



*Hevur gjørt uppskot, sum vísir á leiðir at minka um skattatrýstið næstu 10 árini*

Fólkaflokkurin helt tíðindafund í gjár, har hann kom við uppskoti um hvussu skatturin kann lækkast tey næstu árini.

Skattalættin verður hin sami í krónum fyri láginn og meðalinntøkur og økist við umleið 2000 krónum hvørt ár fram til 2005, síðan nakað minni.

Eftir verandi skipan kann ein tjena 17.000 krónur um árið, áðrenn ein byrjar at rinda skatt. Eftir uppskotinum hækkar hetta botnmark komandi trý árini upp í 30.000 krónur, áðrenn ein byrjar at rinda kommunuskatt og 60.000 krónur í ár 2010, áðrenn ein byrjar at rinda landsskatt.

Lutfallsliga fáa tær lagu og meðalinntøkurnar mesta lættan, 5-6 ferðir meir enn tær største meðalinntøkurnar.

Við verandi búskaparvánum økjast samlaðu inntøkurnar til lands og kommunukassan nakað sum higartil.

Við størri búskaparvøkstri orsakað av fallandi skattatrýsti ber skjótt til at lækka marginalskattin hjá øllum inntøkubólkum.

Miðvísur skattalætti ár um ár skuldi gingið fakfeløgum á møti í ynski teirra um støðugt hækkandi disponibla eftir skatt. Hvør króna í skattalætta telir móti tveimum krónur í brutto lønarhækkan. Samstundis batnar kappingarførið í búskapinum, sigur Fólkaflokkurin.

# Javnaðar- og Tjóðveldislistarnir klárir

*Nú líður væl at fáa listarnar við valevnum til býráðsvalið klárar, og bæði Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava sett navn á síni valevni*

Stefan í Skorini

Bæði Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin høvdu síðsta uppstillingarfund mánakvøldið, har seinasta hond varð løgd á listarnar. Tjóðveldisflokkurin hevur 17 valevni, meðan Javnaðarflokkurin hevur 14 valevni.

Av stórum kanónum á tjóðveldislistanum kunnu nevnast útvarpsmaðurin Jógvan Arge og løgtingsmaðurin Finnur Helmsdal. Býráðsformaðurin Leivur Hansen er sjálvandi at finna á listanum. Johan Mortensen, eisini kendur sum Johan Hot, stillar eisini upp á tjóðveldislistanum.

Tjóðveldis- og Javnaðarlistin verða her prentaðir í heilum líki.

Hjá hinum trimum flokkunum hava allir uppstillingarfundirnir ikki verið enn.

Bent Jákup Hansen, formaður í Suðurstreymoyar Sambandsfelag, sigur, at teirra listi er klárur, men ikki ber til at almannakunngera listan fyrr enn 3. fundur hevur verið.

Hjá Fólkaflokkinum verður 2. og 3. fundur mánadagin, sigur Aage Arnoldson, formaður í Havnar Framburðsfelag. Teirra fyrsti fundur var fyri summarfrítíðina.

Miðflokkurin hevur heldur ikki fingið alt uppá pláss enn, men einaferð í næstu viku er væntandi, at allir listarnir verða klárir.

**Tjóðveldislistin:**
Jógvan Arge, Tórshavn
Hildur Eyðunsdóttir, Tórshavn
Snorri Fjallsbak, Tórshavn
Leivur Hansen, Hoyvík
Finnur Helmsdal, Hoyvík
Katrin Isfeld, Tórshavn
Tórbjørn Jacobsen, Kaldbak
Tórhallur Jakobsen, Argir
Frits Joensen, Kollafjørður
Hanna Joensen, Tórshavn
Tommy Kjærbo, Tórshavn
Arnbjørn Madsen, Argir
Johan Mortensen, Tórshavn
Klæmint Olsen, Tórshavn
Anna Maria Simonsen, Tórshavn
Regin av Steinum, Argir
Súsan Vestergaard, Hvítanes

**Javnaðarlistin:**
Elin Lindenskov, Tórshavn
Torfinn Smith, Tórshavn
Hans Jákup Simonsen, Kollafjørður
Havstein Sigurðsson, Tórshavn
Henning Christensen, Argir
Zakaris Hansen, Argir
Hans Jákup Hansen, Kollafjørður
Hans Madsen, Kollafjørður
Meta Palle, Tórshavn
Vígdis Johannesen, Tórshavn
Ingrid Jakobsen, Tórshavn
Rigmor Dam, Tórshavn
Hendrik Thomsen, Tórshavn
Magni Dalsgaard, Tórshavn